## Slitið finalulið

Tað verður eitt skert B36-lið, sum í kvøld skal royna seg á útivølli móti Skála. Leikbannið hjá Hanusi Thorleifsson gjørdist tveir dagar, og tí er hann framvegis ikki tøkur, og í steypafinaluni fekk Magnus Olsen ein snudd á slitna knæið, og tí er hann heldur ikki tøkur. Hjá Skála er setningurin at toga seg upp um niðurflytingarstrikuna, og eftir fleiri góðar javnleikir fara teir nú eftir øllum stigunum.



## Grannabrak í Gøtu

Tá ÍF í øðrum umfari vitjaði hjá Víkingi, tóku fuglfirðingar tey flestu á bóli við einum sigri. Ein sigur, sum tó vísti seg at vera meira enn bara eitt lítið upplop. Síðani hava fuglfirðingarnir tó mist stevið aftur, og hjá teimum er umráðandi at fáa stig, so teir aftur kunnu lyfta seg frá niðurflytingarvandanum. Tað er ein vandi, sum Víkingur ikki reiðiliga kennir nakað til, men skal sambandið við ovaru liðini haldast, er eisini neyðugt hjá teimum við einum sigri.

# Zlatan fekk sína debut ímóti Føroyum!

**Malmöbúgvin, sum er av bosniskum uppruna, er maðurin, sum alt Fótbólts-Svøríki setur sína lít til**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Svenski landsliðsvenjarin, Lars Lagerbäck útihýsir ikki, at hann verður noyddir at seta svensku fólkahetjuna og kultfigurin, Zlatan Ibrahimovic á beinkin til alt avgerandi dystin ímóti Russlandi í kvøld. Svøríki og Russland hava bæði 3 stig, men Svøríki hevur betri málmun, og kunnu vinna segí fjórðingsfinaluna – har Holland bíðar – við einum javnleiki í kvøld. Men tað er við biva og óttan, at Lars Lagerbäck verður noyddur at seta Zlatan Ibrahimovic á beinkin. Ferð eftir ferð hevur Lars Lagerbäck undirstrika fyri bæði svenskum og altjóða fjølmiðlum, hvønn risastóran týdning Zlatan Ibrahimovic hevur fyri svenska landsliðið. Uttan Zlatan er svenska álopsspælið rættuliga tannleyst.



*Zlatan skoraði ikki, tá hann fekk sín fyrsta landsdyst móti júst Føroyum í januar mánaði í 2001. Men síðani hevur hann vunnið sær status sum kulthetjan á svenska landsilðnum*
*Mynd: Polfoto/AP*

### Belastningurin avgerandi

Belastningurin á knænum hjá Zlatan er ógvuliga avgerandi hvørt hann byrjar inni ímóti Russlandi, ella ikki. Lagerbäck vónar, at styrkisvenjingin síðani dystin ímóti Spania leygarkvøldið hevur gjørt mun, nú tá Zlatan ikki hevur verið noyddur at belasta knæið seinastu dagarnar. Áðrenn dystirnar ímóti Grikkalandi og Spania vandi Zlatan við svenska hópinum, men tað verður nakað hann ikki kemur at gera, áðrenn dystin ímóti Russlandi. – Hetta er ein avgerð, sum eg og læknarnir kring liðið hava tikið saman við Zlatan. Hetta sigur Lars Lagerbäck við svenska blaðið, Expressen.

### Av bosniskum uppruna

Zlatan er føddur 3. oktober 1981 í Malmö, sum er størsti býurin í Skåne. Foreldrini eru bosnar, sum eftirnavnið eisini sigur: Ibrahimovic. Zlatan vaks upp í einum grannalagi, sum nevnist Rosengård. Talan er um eitt grannalag, har rættuliga nógvir tilflytarar búgva. Zlatan hevur - hóast hann nú er ein heimsstjørna – gloymt sínar røtur, og fyri stuttum læt hann byggja eina fótbóltsvenjingarmiðstøð í Rosengård, og fyrsta dagin fótból tsvenjingarmiðstøðin læt upp, so brúkti Zlatan nógva tíð at sparka bólt saman við teimum ovurfegnu smádreingjunum, sum búgva í Rosengård-økinum.

Fyrsta felagið hjá Zlatan æt FBK Balkan, her byrjaði Zlatan at spæla fótbólt, sum 5 ára gamal. Sum navnið á felagnum sigur, so er talan um eitt fótbóltsfelag, sum er stovnað av monnum, sum eru ættaðir av Balkanhálvoynni.

### Fór til Malmö FF

Men tað var skjótt, at fólk bóru eyga við eyðsýndu evnini hjá honum. Zlatan fór frá FBK Balkan til eitt nakað størri fótbóltsfelag, sum eitur BK Flagg, men her steðgaði hann stutt. Fótbóltsrisin í býnum – Malmö FF – fekk hann uppí sín talenthóp í 1994, tá var Zlatan 13 ára gamal. Zlatan gjørdi Fólkaskúlan lidnan, samstundis sum hann vandi nógva talentvenjing við Malmö FF. Hann byrjaði á einum studentaskúla, men her gavst hann aftaná, at ein tíð var farin, tí hann vildi satsa 100% uppá fótbóltin. Í 1999 gjørdist Zlatan yrkisleikari í Malmö FF. Her gjørdi hann tíðliga vart við seg, og tað eydnaðist honum at skjóta 16 mál í 40 dystum fyri Malmö FF. Í 2001 seldi Malmö Zlatan til Ajax Amsterdam fyri 82,5 miljónir svenskar krónur, sum var met í svenskum fótbólti. Væl gekst hjá Zlatani í Ajax, í 74 dystum skoraði hann 35 mál, ella næstan mál í øðrum hvørjum dysti. Tað eydaðist eisini honum eisini at vinna hollendsku steypakappingina tvær ferðir við Ajax, og meistaraheitið einaferð.

### Til Italia

Í august 2004 skifti Zlatan til Juventus í italsku Seriu A. Upprunaliga, so vunnu Zlatan og liðfelagarnir í Juventus italska meistaraheitið í 2005 og 2006, men felagið var dømt at missa bæði meistaraheitini, og Juventus fekk eina tvangsniðurflyting til Seriu B. Hetta hendi orsaka av teimum stóru muturgølunum, sum hendu í felagnum. Zlatan kann kortini ugga seg við, at hann var valdur til ársins fótbóltsspælara í Svøríki í 2005. 9. august í 2006 var Zlatan seldur til Inter Milan, og tað er nakað, sum hvørki Zlatan ella Inter hava angrað. Í 53 dystum higartil hevur Zlatan skotið 32 mál, sum er eitt ógvuliga høgt tal í Seriu A. Zlatan hevur eisini veruliga vunnið tað italska meistaraheitið við Inter í bæði 2007 og 2008, og nú brynjar felagið seg út til at vinna Champions League, og hevur leiðslan í Inter kjósað sær José Mourinho, sum venjara.

### Debut ímóti Føroyum

Av øllum londum, so var tað ímóti Føroyum, at Zlatan fekk sína landsliðsdebut. Hetta hendi í innandura fótbóltshøllini í Växsjö tann 31. januar í 2001. Dysturin endaði 0-0, sum man verða millum fremstu úrslitini hjá Føroyum. Síðani tá hevur Zlatan verið við til 4 HM og EM-endaspøl saman við Svøríki. Rok var kortini áðrenn ein undankappingardyst ímóti Liktinstein í 2006. Tá sendi landsliðsvenjarin Christian Wilhelmson, Olof Mellberg og Zlatan heim, tí teir møttu ov seint á gistingarhúsinum. Wilhelmson og Mellberg tóku við revsingini, men Zlatan svaraði við at boykotta svenska landsliðið teir næstu undankappingardystirnar. Men í 2007 rann saman aftur millum Lagerbäck og Zlatan. Og í kvøld hevur Lagerbäck brúk fyri Zlatan, meir enn nakrantíð, men enn liggur tað í óvissuni, um Zlatan kann byrja inni. Lagnan hjá Svøríki kann verða tengd at knænum hjá Zlatani.

**HB-KÍ:**

## Summarturkur í klassikaranum

**Úrtøkan hjá bæði KÍ og HB, sum skal hava nýggja liðformann í kvøld, hevur ofta verið størri, enn hon hevur verið seinastu ferðirnar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

HB fær mikukvøldið vitjan av KÍ. Klassikarin hevur ofta havt størri áhuga millum onnur enn viðhaldsfólkini hjá feløgunum, enn hann er hesa ferð.

Felags fyri bæði liðini er, at úrtøkan ikki hevur verið so stór tær seinastu ferðirnar. HB hevur burturúr fimm teimum seinastu umførunum vunnið nýggju stig, og í somu umførum hevur KÍ vunnið sjey stig.

Hjá KÍ er Kristian á Lakjuni við aftur eftir skaðasteðg. Tað verður arbeitt við at fáa loyvini hjá amerikanska álopsspælaranum Joe Zewe upp á pláss. Tað tykist ikki serliga sannlíkt, at hetta verður komið upp á pláss til mikukvøldið. Stefan Kalsø er skaddur, og Bjarni Jørgensen er ikki komin nóg langt í venjingini til, at hann er førur fyri at spæla.

Hjá HB er neyðugt at velja nýggjan liðformann, tí Fróði Benjaminsen er leikbannaður. Tað tykist sannlíkt, at Vagnur Mohr Mortensen verður nýggjur miðverji. Milan Kuljic og Mortan úr Hørg vandu fyri fyrstu ferð í gjárkvøldið, eftir at teir hava verið skaddir eina tíð.